# Zuma saknar Toda

**Lítil tyngd var í FCK álopinum, tá talan var um null–loysn í Parkini ímóti Ajax**

UEFA CUP
*Jóannes Hansen*

Tað var áhugaverd vitjan í Parkini í Keypmannahavn hóskvøldið. Og tað lótu fleiri enn tjúgu túsund áskoðarar ikki fara aftur við borðinum.

Ajax hevur ikki somu styrki, sum teir hava havt, tá teir hava verið á aldukambinum, men teir vóru nóg góðir at geva FCK góða mótstøðu.

FCK var á afturpartinum síðsta hálva tíman av fyrra umfarinum. Teir tóktust strongdir, teir mistu skjótt bóltarnar, og fyri tað mesta runnu teir aftaná snillingunum úr Ajax, sum dugdu væl at lata bóltin ferðast skjótt um alla breiddina á vøllinum og við at spæla djúpt ella diagonalt.

Tað var málleyst í steðginum, hóast bólturin tvær ferðir hevði verið í netinum. Magnus Kihlstedt í FCK málinum stóð seg sera væl, men hann var prísgivin, tá innlegg úr vinstru varð stútað í handara síðunetið. Ajax spælararnir fegnaðust um týdningarmikla málið á útivølli, men linjuverjin segði, at talan var um rangstøðu. Tað vóru fremmandu menninir ikki væl nøgdir við, og endurtøkurnar í sjónvarpinum vístu, at dómurin var sera ivasamur.

Síðstu løtuna vóru tað FCK menninir, sum vóru rísnir. Dómarin metti, at Thomas Røll hevði trýst ov nógv niður á ryggin á mótstøðumanni, tá hann við handara stólpan stútaði frísparksinnlegg frá Carsten Fredgaard í málið. Endurtøkurnar vístu, at dómarin var á góðari leið.



### Stórur møguleiki

Í 2. hálvleiki var FCK væl betri við. Teir høvdu bóltin meiri, og teir áttu havt skorað í hvussu so er eitt mál.

Undan dystinum var tað ivasamt, um Heine Fernandez fór at vera tøkur. Hann var á beinkinum fyrsta tíman. Zuma var einsamallur á toppinum og Thomas Røll hangandi álopsmaður. Tíggju minuttir eftir at Fernandez var komin á vøllin, fekk hann ein fínan møguleika. Málverjin hálvbjargaði flatari skotroynd av brotsteigarmarkinum frá Niclasi Jensen, Fernandez var fyrstur á, men hann sendi í krovið á málverjanum, sum ikki var komin heilt á beinini aftur.

### Vil hava makkara

Zuma var í sýnisglugganum. Fyrrverandi italski landsliðsvenjarin Arrigo Sacchi var í Parkini fyri Milan. Ørindini vóru at sýna suðurafrikanaran, sum í dystunum ímóti Lazio fyrr í summar stóð so sera sterkur í myndini.

Men hesa ferð lá einki serligt fyri. Zuma helt, at tað ikki er nóg stór tyngd í álopsspælinum, tá teir bara spæla við einum manni í álopinum. At FCK bara hevur ein mann heilt frammi, er ein neyðloysn, tí fleiri álopsspælarar eru skaddir. Tað er eingin loyna, at Zuma og Todi Jónsson spældu sera væl saman fyrr í summar. Um tað samanspælið hevði hildið fram, so hevði sannlíkið fyri, at Zuma varð seldur, verið nógv størri.

Um tvær vikur verður returdysturin í Amsterdam. Venjarin hjá Ajax heldur, at teir eiga at hava góðar møguleikar, men hann vísir á, at um tað eydnast FCK at skora eitt mál, so verður neyðugt hjá Ajax at skora tvær ferðir. Tí er einki avgjørt. Og so mugu vit bara vóna, at Todi Jónsson verður undir liðini á Zuma í Amsterdam um tvær vikur.

### Brøndby illa statt

Kroatiska Varteks sendi í fyrsta umfarinum av UEFA Cup Aston Villa og Peter Schmeichel úr kappingini. Tí var tað greitt, at uppgávan hjá Brøndby fór at vera torfør, tá teir hóskvøldið vóru í Kroatia.

Tað var málleyst í steðginum, men í 2. hálvleiki skrædnaði hjá Brøndby. Heimaliðið vann 3–1. Í Brøndby heingja teir seg í, at tað eydnaðist at skora eitt týdningarmikið útivallarmál. Á heimavøllinum verða teir noyddir at spenna álopsbogan. Men mest sannlíkt er tað, at Brøndby ikki verður í hattinum, tá lutur verður drigin til triðja umfarið, og tað man eisini vera ivasamt, hvussu tað verður hjá FCK. Tað er ikki minst treytað av, hvussu tað fer at hilnast hjá Zuma og vónandi Toda.

## B93 niður á jørðina

**Sparingar, avskrivingar og nýggir pengar skulu bjarga gamla stórfelagnum**

KREPPA
*Jóannes Hansen*

Øssur Hansen hevur síðani summarsteðgin verið fulltíðar fótbóltsspælari í B93 í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Men tað verður hann ikki komandi ár. Talan er um eina søkkandi skútu, og í donsku fjølmiðlunum í gjár segði Henrik Engel, sum er ein av ábyrgdarmonnum, at nú verður eingin spælari í fulltíðar starvi hjá B93.

– Vit hava ferðast á fyrsta klassa í nøkur ár, og nú skulu vit rinda rokningina, sigur ábyrgdarmaðurin.

Fíggarligu trupulleikarnir skulu loysast upp á tríggjar mátar. Eingir spælarar skulu vera í fulltíðarstarvi, og allir skulu niður í løn. Tey, sum eiga pengar til góðar í B93, mugu lata sær lynda bara at fáa ein part, og so fer felagið runt við hattinum fyri at fáa nýggjar pengar at seta í felagið.

# Seks landsliðsspælarar í eldin

**Í Hollandi skal Zwolle spæla toppdyst, og í Noregi skal Molde tryggja sær UEFA Cup pláss**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*

Um Føroyar skulu koma hægri á altjóða styrkislistanum, so skulu føroyskir landsliðsspælarar vera í sving ein størri part av árinum. Hetta var ein av boðskapunum, sum Allan Simonsen hevði, tá Sosialurin gjørdi fyrstu samrøðuna við hann. Tað var miðskeiðis í mai 1994.

Einastu føroysku spælararnir, sum tá vóru uttanlands, vóru Todi Jónsson og Jákup Mikkelsen, sum vóru um at fáa fótin fastan í ávikavíst Lyngby og Herfølge.

Nú er heilt øðrvísi vorðið. Tað eru tríggjar vikur síðani, at átjanda og síðsta umfarið var á skránni í heimligu landskappingini. Men kortini fara seks landsliðsspælarar at spæla landskappingardystir í vikuskiftinum.

Í Hollandi verður toppdystur í næstbestu deildini, tá FC Zwolle fær vitjan av ADO Den Haag. Zwolle er næstfremst við 20 stigum fyri níggju dystir, og ADO er á fjórða plássi. Teir hava seytjan stig fyri átta dystir. Súni Olsen var ikki á liðnum hjá Zwolle síðsta vikuskifti.

Í Onglandi skulu Julian Johnsson og Hull spæla á útivølli. Á pappírinum tykist talan vera um ikki so ógvuliga torføra uppgávu. Rushden og Diamonds eru á tólvta plássi, meðan Hull er nummar trý.

Í Noreg fáa Molde og Jákup Mikkelsen vitjan av Brann úr Bergen. Felagið hjá íslendska venjaranum Teituri Þordarsyni var væl við í toppinum fyrra partin av kappingini, men nú eru teir á sætta plássinum. Sum so mong onnur feløg í Europa, so er Brann í stórum fíggjarligum trupulleikum. Teir hava 20 milliónir í rakstrarhalli í ár. Tað kemst eitt nú av, at teir bara hava selt ein spælara í ár. Tað var Magnus Kihlstedt, málverjin, sum fór til FCK fyri 3,5 milliónir krónur. Teir høvdu roknað við at selja spælarar fyri 24 milliónir í ár.

Um eydnast Molde at vinna, so tryggja teir sær longu undan síðsta umfarinum atgongumerki til UEFA Cup komandi heyst.

Í næstbestu donsku deildini fær Hvidovre við Óla Johannesen á liðnum vitjan av HFK Sønderjylland, sum síðsta vikuskifti á heimavølli vann 3–2 á B93 við Øssuri Hansen á liðnum. B93 fær vitjan av oddaliðnum úr Køge, og Randers Freja skal vitja í Skive.

Todi Jónsson verður neyvan á liðnum hjá FCK, sum fær vitjan av Lyngby. Johan B. Hansen tykist framvegis ikki vera í nánd av liðnum hjá OB, sum fær vitjan av Silkeborg. Christian Høgni Jacobsen spældi síðsta vikuskifti fyri fyrstu ferð á besta liðnum hjá Esbjerg. Nú eru fleiri spælarar, sum hava verið skaddir, tøkir aftur. Sambært heimasíðuni hjá Esbjerg verður Christian Høgni ikki í hópinum, tá Esbjerg í morgin fer til Viborg. Í staðin fer hann at spæla á næstbesta liðnum.



SAMSKIPARI

Fyri eitt av stóru íttróttarfeløgunum í landinum, søkja vit eftir einum samskipara. Talan er um eitt nýtt starv, ið viðkomandi persónur sjálvur kemur at verða við til at byggja upp. Talan er um eitt fjølbroytt starv, ið m.a. inniheldur fylgjandi arbeiðsuppgávur:

**Høvuðsuppgávur:**
- Fyrireika og samskipa ymisk tiltøk, so sum stevnu, sølustevnu, lutaseðlasølu, v.m.
- Skaffa felagnum sponsorar og stuðlar
- Skaffa lýsingar til vøllin, leikskránna, v.m.

Umframt omanfyrinevndu uppgávur skal viðkomandi persónur eisini virka sum skrivari hjá starvsnevndini, og syrgja fyri neyðugum samskifti og neyðugari kunning innanhýsis sum uttanhýsis. Víðari verður talan eisini um vanligar umsitingarligar uppgávur.

Sum persónur ert tú fyrikomandi og hevur lætt við at samskifta við onnur. Tú kemur fyri tað mesta at arbeiða fyri teg sjálvan, og tí er neyðugt, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ikki ert bangin fyri avbjóðingum.

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 26. oktober 2001 til: **Virkisráðgeving Spf. Boks 26, 600 Saltangará**. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Dánial Petur Hansen ella Símun Hammer á Virkisráðgeving, tlf. 44 95 91. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf
Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo

Fjalsgarður
til sølu ella til leigu



Fjalsgarður, matr. 85 í Oyndarfirði, kann nýtast:

sum samkomuhús
sethús
vinnuvirki
goymsluhús
leguhús
skrivstova
skeiðdepil

Í ovaru hæddini er vælútgjørdur køkur, stova og 5 kømur.

Í niðaru stórur salur.

Áhugað kunnu venda sær til:
Niels O. Joensen, tlf. 219899 ella
Jákup Lindenskov, tlf. 283808

S/pf. Mál & Mentan

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Stuðul 20 tímar um vikuna

Stuðulsfólkaskipanin søkir eftir stuðli 20 tímar um vikuna at arbeiða seinnapartar.

Arbeiði:
Til Bridgehúsið verður søkt eftir stuðli til 14 ára gamla gentu við Downs syndromi.

Í Bridgehúsinum eru 11 børn frá 8-16 ár við serligum tørvi og við hvør sínum stuðli.

Førleikakrøv:
Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur gjørt sær nakrar tankar og hevur hug at arbeiða við ungum so tey fáa ungdómsavbjóðingar svarandi til menningina..

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin er búgvin og opin fyri ráðgeving og menning í arbeiðinum.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita við at venda sær til Herborg Nyholm Debess, pedagogiskan ábyrgdara ella Hannu Jacobsen, leiðara.

Umsókn:
Umsókn við viðmælum og upplýsingum um royndir og útbúgving , skal verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 2. november 2001.

SNARSKIVAN

Starvsfólk til Goymsluna

"Viðskiftafólk eru ikki viðskiftafólk. Viðskiftafólk eru menniskju"

Ókendur



Søkt verður eftir starvsfólki til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. november 2001 ella skjótast møguligt.

**Uppgávurnar eru:**
Vøruútflýggjan, skráseting og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

**Tín førleiki:**
Umsøkjarin skal hava goymsluútbúgving ella hava royndir innan goymslu ella líknandi. Dentur verður lagdur á, at tann sum sett/-ur verður kann veita eina góða tænastu, kann arbeiða sjálvstøðugt og arbeiða væl saman við øðrum.

**Eisini er fyrimunur um tú hevur:**
· royndir við EDV (á brúkarastøði)
· góðan røkjuskap
· kunnleika til enskt

**Føroya Tele kann bjóða eitt starv**
· í einum mennandi umhvørvi
· við fakligari og persónligari menning
· í góðum arbeiðsumhvørvi

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarvi við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framíhjárætt til ansingarpláss.

Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Tele.

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Eliasson Egholm á tlf. 303224 ella til Starvsfólkadeildina á tlf. 303114.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Umsókn við avrit av prógvum og møguligum ummælum, skal verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggadagin 26. oktober 2001

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Goymslan á Føroya Tele tekur sær í høvuðsheitum av innanhýsis sølu og innkeypi til tær ymisku deildirnar á Føroya Tele. Høvuðsvøra okkara eru jørðkaðalar, transmissiónútgerð, alskyns telefonlutir, installatiónútgerð, skrivstovulutir og mangt annað. Á Goymsluni starvast 5 fólk.**

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!